DAGSINS MEINING

Ein íløga í framtíðina

Sambært formanninum í Granskingarráðnum Eyðun Andreassen, so nýta vit føroyingar bert 0,7 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni at granska fyri. Hetta sigur hann í áhugaverdum og frameftirlítandi viðtali við Dimmalætting fyrr í vikuni. Sambært OECD er 3 prosent tað minsta, ið ett land eigur at nýta til gransking, um landið vil varðveita sína støðu í kappingini við onnur lond.

Hví man føroyska talið verða so lágt? Kann tað hugsast, at partar av vinnuni og politisku skipanini enn síggja gransking sum eina útreiðslu. Hetta má ikki vera so. Gransking er einki minni enn ein íløga í framtíðina, og eigur gransking og menning at verða ein integreraður partur í allari framleiðsluvinnu og ryggásin í øllum vinnupolitikki.

Tað almenna eigur ein lyklaleiklut, tá tað kemur til gransking, og tí er áhugavert, at gransking verður raðfest høgt í samgonguskjalinum, men umráðandi er, at gerðir fylgja føgru orðunum.

Eisini er umráðandi, at politikarnir fylgja ráðunum frá formanninum í Granskingarráðnum, tá hann sigur, at vit føroyingar sjálvandi ikki skulu granska á øllum økjum. Her, eins og í flestu øðrum viðurskiftum, tykist raðfesting vera eitt lyklaorð. Eyðun Andreassen mælir í omanfyrinevnda viðtali til at granska í havinum og tilfeinginum rundanum okkum annars, tá tað kemur til vinnugransking. Tá tað kemur til gransking generelt, so metir formaðurin í Granskingarráðnum, at vit føroyingar hava eina skyldu at granska í tí, sum er serligt fyri Føroyar, tí at eingin annar ger tað.

At ferð verður sett á fiskivinnugranskingina í hesum døgum er avgjørt eitt stig á rættari leið. Pressufundur verður hesum viðvíkjandi í komandi viku, og spennandi verður at frætta frá hesum.

Fyri tíð síðan segði stjórin á Menningarstovuni, at tað vísti seg, at áhugin í vinnuni fyri at ganga nøggjar leiðir, við nýggjari framleiðslu og nýggjum marknaðum minkaði, tá nógv var at gera í Føroyum, og hækkaði, tá tað bleiv meir svangligt heima. Her eigur tað almenna at hava ein førandi leiklut í samstarvi við vinnuna at tryggja eina meira konsekventa framferð, tá um gransking og menning ræður.

Tað er ein sannroynd, at búskaparligu sveiggini í samfelagnum gerast minni, tess longur man flytir seg frá reinari rávøruframleiðslu til liðugtgjørdar vørur, ið fara beint á altjóða brúkaramarknaðin ella á høgt spesialiseraðar marknaðir innan hátøkni ella biotøkni. Hetta krevur framhaldandi menning, og framhaldandi gransking í nýggjum framleiðslum og nýggjum útflutningsmøguleikum og hættum.

Tað skal verða okkara vón, at samgongan fer at vísa í verki, at orðini í samgonguskjalinum um gransking veruliga merkja nakað, og at vinnan framhaldandi styrkir um sín leiklut í granskingarumhvørvinum í Føroyum. Tað er eisini gott og rætt, at miðlarnir taka slík evni upp og viðgera tey – tí harvið eru teir við til at minna myndugleikarnar á tað teir hava lovað og sett út í kortið.

Sosialurin

»Ábyrgd fyri egnari heilsu 2004«

Tilhaldið í Tórsgøtu í Havn skipar týsdagin fyri tiltaki, har Jóhanna á Tjaldrafløtti, sum er føðslu- og húshaldsfrøðingur, fer at geva sítt boð uppá, hvat vit sjálv kunnu gera fyri at varðveita eina góða heilsu

HEILSA

Tiðindaskriv frá Tilhaldinum

Sameindu Tjóðir lýstu árið 1999 at vera ár teirra gomlu. Í hesum sambandi var eisini her á landi gjørt rættiliga nógv burtur úr hesum tiltaki. Endamálið var at skapa betri fatan í samfelagnum fyri teimum avbjóðingum, sum tann vaksandi bólkurin av fólki, ið farin er um pensjónsaldurin, setur bæði samfelagið og til tey sjálv.

Somuleiðis samtykti sosiala nevnd hjá kommununi í 1996 at seta ein arbeiðsbólk, hvørs arbeiðssetningur var at koma við uppskoti um, hvønn eldrapolitikk kommunan eigur at føra. Og í sambandi við »Altjóða eldraáriið« 1999, kom so »Eldraálitið« hjá Tórshavnar kommunu.

Í oktober 2000 setti landsstýrismaðurin í almannamálum ein arbeiðsbólk at gera eina lýsing og meting av eldraøkinum. Í 2002 kom úrslitið av arbeiðinum. Álit um eldraøkið.

Politiski málsetningurin í álitinum er við grundarlagnum í meginreglunum hjá ST. Høvuðsboðskapurin hjá ST er, at øll lond eiga at **stremba eftir einum samfelag fyri allar aldursbólkar.** ST áleggur heimsins stjórnum at taka niðan fyri standandi meginreglur til eftirtektar og gera tær til lógarfestan part av almannapolitikkinum skjótast til ber. Rættur teirra gomlu er í høvuðsheitum: **Sjálvbjargni, luttøku, umsorgan, menning og sjálvsvirði** (sjá fylgiskjal).

Hesi seinnu árini er talið á fólkum yvir 65 ár vaksið í stórum, og livitíðin gerst longri og longri. Stundum hoyra vit henda aldursbólk umtalaðan sum eitt vandamál í samfelagnum. Hetta man helst koma av, at útreiðslurnar til eldraøkið eru skjótt vaksandi, tað veri seg til pensjónir, ellis- og røktarheim, sjúkraviðgerð, heimahjálp o.s.fr. Hendan myndin gongur aftur í øllum tí framkomna Vesturheiminum.

Tað er væl skiljandi, at tess fleiri røktarkrevjandi fólk,ið verða, tess størri gerast útreiðslurnar fyri samfelagið bæði til røktarheimspláss og til rakstur av heilsuverkinum. Orsøkirnar til, at fólk gerast óhjálpin kunnu vera so mangar. Ein av teimum eru tær sjúkurnar, sum standast av vælferðarliviháttinum.

Tilhaldið í Havn er eitt av teimum støðunum, har roynt verður at gera teimum gomlu ein møguleika fyri at fáa eitt ríkari innihald í gerandisdagin, eftir at tey eru farin út av arbeiðsmarknaðinum. Við meginreglunum hjá ST í huga, fer Tilhaldið undir átakið »Ábyrgd fyri egnari heilsu 2004«.

Vit hava heitt á átta fólk, sum í sínum starvi hava serligar førleikar fyri at lýsa hetta evnið hvør út frá sínum sjónarhorni. Á hendan hátt vóna vit at hava sett eitt orðaskifti í gongd, sum kann vera við til at motivera gomul eins væl og yngri til at umhugsa sín livihátt og gera sítt til, at fáa ein so heilsugóðan aldurdóm sum gjørligt.

Fyrsta tiltakið verður í Tilhaldinum í Tórsgøtu, týsdagin 24. feb. 2004 kl. 14.00. Tá fer Jóhanna á Tjaldrafløtti, sum er føðslu- og húshaldsfrøðingur og leiðari á Húshaldsskúla Føroya at geva sítt boð uppá, hvat vit sjálvi kunnu gera fyri at varðveita eina góða heilsu.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

Mótmæla rullubrettisbreyt

Íbúgvar í Magnus Heinasonargøtu í Havn mótamæla, at býráðið tekur parkeringspláss til rullubrettisbreyt

PARKERINGS-VIÐURSKIFTI

Eirikur Lindenskov

Á býráðsfundi í Havn í gjárkvøldið varð býráðnum handað eitt mótmælisskriv frá borgarum niðast í Magnus Heinasonargøtu í Havn. T. e. gøtan frá Sverr isgøtu oman móti parkeringsplássinum sunnan fyri Margarinfabrikkina.

Orsøkin til mótmælið er, at býráðið hevur tikið parkeringsplássið til eina rullubrettisbreyt:

Íbúgvarnir siga í mótmælinum:

»Undirritaðu íbúgvar í og grannar til Magnus Heinasonargøtu mótmæla hervið ætlanum býráðsins at taka parkeringsøkið niðarliga í gøtuni til rulluskoytubreyt til Margarinfabrikkina.

Orsøkin til mótmæli okkara er heilt einfalt tann, at í M. Heinasonargøtu er frammanundan nærum ógjørligt at sleppa av við bilar – uttan í tíðaravmarkaðu p-básunum og er hetta eingin loysn fyri tey, sum búgva her.

Í M. Heinasonargøtu eru bæði sethús og virkis- og handilshús við tørvi á nógvum parkerinsbásum. Hesin tørvur er ikki nøktaður sum er. Eisini um tit banna allari ferðslu í niðara parti av Magnus Heinasonargøtu, hvussu skulu vit, sum búgva her, so sleppa til hús við vøru og øðrum?

Nevnda parkeringsøkið, sum ætlanin er at gera til rulluskoytubreyt, er heldur ikki egnað til hetta endamál. Hví ikki finna hesum ungu eini hús og øki í útjaðaranum av býnum, har tey í friði og náðum kunnu gera sær hóskandi breyt og lata hesar fáu (4) parkeringsbásarnar vera til íbúgvarnar í gøtuni? Margarinfabrikkin kundi síðani sum frá leið verðið umgjørd til P-hús.

Við vón um at mótmæli okkara verður tikið til eftirtektar.«

Aftan á handanina fekst at vita, at tann uppsetta breytin bert skal standa í ein mánað. Men hvat síðani skal henda varð einki sagt um.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Kongamorðið í Fólkaflokkinum

Abraham Mikladal

Er Anfinn Kallsberg, fólkafloksveljararnir og fyri alt tað øll onnur ikki greið yvir, at støðan, sum Anfinn er komin í, er ein samanblanding av óhepnu gerðum Kallsbergs og kynisku telvingini hjá Óla Breckmann?

Óli Breckmann, ið er sambandsmaður um ein háls, gjørdist skjótt troyttur av fullveldisgongdini, so sum hon var avtalað í samgonguskjalinum 1998. Hann byrjaði so at siga beinanvegin at mótarbeiða og senda negativ signal út til og ígjøgnum fjølmiðlarnar.

Tá hann so hómaði møguleikar, sum kundi benda fólkaflokkin á sambandskós, tók hann kjansin. Hann ynskti Anfinn Kallsberg burtur, og ein sambandsmann í Fólkaflokkinum framat.

Óli Breckmann kroysti Anfinn meira og meira. Hetta kundi hann m.a. við at nýta fortíðina hjá Anfinni. (mafia stílur).

Tá so samráðingarnar við donsku stjórnina slitnaðu, og landsstýrið ynskti at loysa knútin við eini fólkaatkvøðu, fekk Anfinn greið boð um, at hann skuldi avlýsa ætlaðu fólkaatkvøðuna, ella skuldi Óli Breckmann saman við øðrum syrgja fyri, at Fólkaflokkurin fór í tvíningar!

Hetta kundi Anfinn Kallsberg ikki hava sitandi á sær og avlýsti tískil fólkaatkvøðuna.

Anfinn var tó so heppin at fáa tvey kort á hondina, sum kundu fjala veruleikan, og tað vóru veljarakanningin og orð forsetisráðharrans.

Tá Torbjørn Jacobsen í lesarabrævi stutt undan ólavsøku 2002 segði sum var um Anfinn, sá Óli Breckmann aftur ein møguleika at steðga fullveldisgongdini. Hann kravdi eina treytaleysa umbering frá Tjóðveldisflokkinum í teirri vón, at samgongan slitnaði, men nei.

Tobbi bað um fyrigeving, hóast tað má hava verið ein herkin biti at svølgt, tí tað skuldi vísa seg, at hann einki skeivt hevði sagt.

So frætti Óli Breckmann um bókina "Skjót journalistin". Hann var greiður yvir, at tá líkið í lastini hjá Anfinni kom uppá dekkið, fór deymurin at verða so ringur, at nærum eingin kundi góðtaka tað. Og at sannlíkt var, at Anfinn fór at biðja um umbering fyri tað, ið var hent á ólavsøku 2002 - og fáa umbering.

Fyri at tryggja, at Anfinn ikki fekk høvði til ella fann uppá at viðganga sínar feilir og biða um umbering, gjørdi Óli, saman við tingmanningini, skjótt av og sendi skriv til Tjóðveldisflokkin.

Við bókini "Skjót journalistin" varð staðfest, at tað, ið Anfinn Kallsberg alla tíðina hevði noktað fyri var veruleiki, umframt mangt annað, ið ikki var almenninginum kunnugt áður.

Nú kundi staðfestast, at Torbjørn Jacobsen einans hevði sagt sannleikan, men var trýstur av Anfinni

Kallsberg (les: Óla Breckmann), til at biða um umbering. Tobbi visti óivað, hvat skitið spæl búði undir, tí sum hann segði "eg ætli mær ikki at sita eftir við apuni"

Tjóðveldisflokkurin hevði nú mist álitið á Anfinn Kallsberg sum løgmanni, tí hann ferð eftir ferð hevði sagt ósatt um sína fortíð og somuleiðis misnýtt løgmansæmbætið fyri at leggja lok á persónlig viðurskifti. Tað sama høvdu sambands- og javnaðarflokkurin, teir vóru til reiðar at seta fram misálit.

Hetta passaði Óla Breckmann sum fótur í hosu. Nú var bara at avvísa einioghvørjari semju, so var avleiðingin, at nýval bleiv útskrivað og nýggj sambandssamgonga kundi skipast, har Anfinn var útihýstur frá at blíva løgmaður ella landsstýrismaður.

Nú skuldi Anfinn gagnnýtast fult út, áðrenn hann bleiv vrakaður. Tí vrakaður bleiv hann, tað visti Óli Brekmann - og Óli ynskti eisini Anfinn burtur sum løgmann, men hann vildi hava aðrar at gera tað skitna arbeiðið.

Nú var at fáa sum mest burturúr til valið. Leggja so nógv hatur á tjóðveldisflokkin, so tað ikki kundi renna saman aftur millum fólkaflokkin og tjóðveldisflokkin eftir valið og samstundis gera Anfinn Kallsberg til ein pínslavátt, so at hann kundi útvega flokkinum sum mest atkvøður.

Hetta eydnaðist lutvíst. Fólkaflokkurin fekk ikki nakra stóra framgongd. Anfinn fekk eitt gott persónligt val, og frástøðan til tjóðveldisflokkin var gjørd so mikið stór, at har var trupult at finna saman aftan á valið.

Ikki tí, tjóðveldis- og miðflokkurin ynsktu at halda fram saman við fólkaflokkinum.

Hetta ynskti Anfinn Kallsberg eisini, men hann mátti ásanna, at hann hevði mist "tamarhaldið á flokkinum".

Tá so dreymurin hjá Óla Breckmann & co var um at gerast veruleiki, gjørdist tað brádliga Anfinni Kallsberg greitt at hann var útnyttaður og svikin av sínu egnu. (Eisini tú sonur mín Brutus)

Hann var týðiliga skelkaður og vónbrotin, tá hann mátti ásanna at hann var fallin í einari kyniskari telving frá Óla Breckmann og hansara sambands hondlangarum í fólkaflokkinum.

Nú er so kabalin hjá Óla Breckmann gingin upp. Sjálvstýrisvongurin í fólkaflokkinum hevur mist takið. Óli Breckmann hevur steðgað fullveldisgongdin, og somuleiðis hevur hann fingið ein "sambandsløgmann" og ikki at gloyma - krúnprinsur hansara, fólkaflokssambandsmaðurin Bjarni Djurholm er vorðin varaløgmaður.

Gev fólkinum tað tey ynskja

Jón Guttesen

Nú rokningin til útvarpsgjaldið kom inn um gáttina og TSVS rungar í útvarpinum er ikki annað fyri hjá hesum lesarbrævhøvundinum enn at vísa sína ónøgd. Public Service ábyrgdin liggur tung á almennu fjølmiðlunum, og hesin lesarabrævhøvundurin vil verða við at almennu fjølmiðlarnir megna ikki at lyfta hana. Tað vil hesin lesarabrævhøvundurin royna gera uttan at niðurgera tað megnararbeiði, sum menn og kvinnur dag aftan á dag gera í hesum miðlum fyri Føroya fólk.

»Vit geva fólkinum tað tey ynskja« plagar at verða undanførslan, tá privatir fjølmiðlar lata frá sær sendingar, ið verða mettar at verða einstáttaðar ella hava lítið virði. »Gev fólkinum tað tey ynskja« var av tilvild eisini orðatakið í Romverjar høvdu á lofti meðan glatiatorarnir bardust við lívinum í vága í Coliseum - so kundu Senati og Ceasar ráa sum teir vildu.

Tað er ein ógvuslig andstøða í millum at geva fólkinum tað tey ynskja og public service ábyrgdin. Og hesin lesarabrævhøvundurin meinar at almennu Føroysku miðlanir leggja í ov stóran mun áherðslu á tað fyrra heldur enn tað seinra - at geva fólkinum tað ta ynskjur heldur enn at tæna tí.

Ábyrgdin á tínum herðum

Public Service - í tænastu fólksins, merkir í stuttum at hesir miðlar hava eina ábyrgd í samfelagnum og eina ábyrgd fyri mentanini ið liggur omanfyri aðrar ábyrgdir.

Fjølmiðlalógávan í londunum kring okkum áleggur til dømis almennum miðlunum at

- teir skulu tryggja at fólki hevur eitt fjáltáttað og høgtgóðska úrval av sendingum
- at sendingar og tænastur annars skulu fevnað um tíðindaflutning, upplýsing, frálæra, list og undirhald
- at tað er alneyðugt at frælsi til upplýsing og tælifrælsi verða vird.
- at miðlarnir í øllum viðurskiftum eru uttanveltaðir og óvildarligir
- at miðlarnir tryggjað fólkinum upplýsing og kjak um teirra samfelag
- at mál og mentan fáa bestu sømdir
- at margfaldi í listini og í mentanini verður vird fær innivist í sendingunum

Hesin lesarabrævhøvundurin spyr um lesarin kann kenna teir føroysku almennu miðlarnar aftur í hesum krøvum.

Gev okkum undirhald við góðsku

Undirhaldið hevur góðar dagar. Vit ringja og skriva og ynskja okkara kærum tillukku og velja sangir og greiða frá veðrinum og um gerðandisdegnum. Hetta gerða vit í so stóran mun at 2 rásir eru á tremur við hesum. Tað er vorði jól alt árið. Og sjálvandi skal hetta eisini hava innivist hjá okkara miðlum.

Men tað má verða ein javnvág í. Mentan er eisini undirhald og undirhald er eisini mentan. Undirhald við biti í, við innihaldi og tyngd og sum hevur hægri góðsku enn alment prát má væl eisini kunna hoyrast í okkara miðlum.

Gev okkum drúgv tíðindi

Tað er eyðsað at almennu miðlanir brúka stóra orku upp á tíðindaflutningin. Tey skjóttsøgdu tíðindini í ÚF eru væl umboðaði tíðliga og seint, og Dagur og Vika ferð við meginpartinum av orkuni hjá SVF.

Men tað er nú einaferð soleiðis at besti eginleikurin hjá skjótt søgdum tíðindum, er at tey eru - skjótt søgd. Tá er ikki tíð til at spyrja hví og hvussu, ella at greiða frá samanhenginum, fordømum, avleiðingum ella rákinum. Tey drúgvu tíðindini sum ikki kunnu lesast upp uppá 2 minuttir er ikki pláss fyri. Tá tikið verður saman um vikuna í fór verða skjótt søgdu tíðindini klipt niður so tey verða enn meira skjótt søgd, og uttan at verða viðgjørd.

Gev okkum drúgv tíðindi. Tey tíðindi sum hava samanhang og avleiðingar og sum okkara fremstu høvd kunnu greiða frá í tímar. Og lat tey sleppa tað. Lat tey greiða frá í tað óendaliga um hesi tíðindini, og lat fólk sum hesi tíðindi hava avleiðingar fyri greiða frá avleiðingunum.

Gev okkum upplýsing og kjak um samfelagi

Almenna kjaki í Føroyum hevur sera, ella sum onkur fjølmiðlamaður hevði orðað ta, sera sera sera ringar sømdir. Kjaki um okkara samfelag eigur als ikki innivist í miðlunum og harvið ikki innivist í almenna rúminum.

Kjakmentanin í Føroyum er útdeyð, í stóran mun vegna útlendskar og føroyskar fjølmiðlar sum leggja hald á okkara frítíð. Hesin lesarabrævhøvundurin vil haldað miðlanar uppá at tað er teirra ábyrgd at bróta slóð fyri tí almenna kjakinum og endurreisa tað føroysku kjakmentanina, eina mentan har í okkara samfelagsviðurskifvið verða viðgjørt og kjakast um og harvið verða livandi og viðkomandi.

Gev okkum betri og ikki meira

Tað er frammi ferð eftir ferð tá almennu miðlarnir verða kritiseraðir at grundgevingin fyri standin í almennu føroysku miðlunum er at peningur ikki er tøkur og tað kostar at gerða Føroyskar sendingar.

Tað er púra rætt at tað kostar at gerða Føroyskar sendingar, og tað er rætt at fjølmiðlaframleiðsla er kostnaðarmikil. Men góðska kostar ikki, góðska liggur ikki í teimum pengunum sum verða brúgtir til framleiðslu, men í tilgongdini at framleiða, í framleiðsluni sjálvari.

Hesin lesarabrævhøvundurin krevur ikki meira, men eina hægri góðsku.

Hvat billar tú tær inn, Karstin Hansen?

Napolion Magnussen

Gjørdist ikki sørt kløkkur tá eg hoyrdi Karstin Hansen í Útvarpinum á dógura mikudagin 18/2. Segði, at teir ið nú eru komnir til, bert sáa mistreysti, nú útlitini eru nógv versnað.

Hann hevur sitið sum fíggjarmálaráðharri í seks ár vi bestu búskaparligu gongd, ein kann hugsa sær.

Hann hevur givið loyvi til at pumpa okkara almenna forbrúk upp á eitt alt ov høgt støði, ið nú má skrúvast niður.

Hann, og hansara samgonga, hevur ongar alternativar inntøkur skapt, men hevði, eftir hansara uppskoti, ætlanir um at hækka skatt og avgjøld fyri at klára at halda standardin í hann sjálvur hevur sett.

Hann hevur helst verið tann vánaligasti fíggjarmálaráðharrin, Føroyar hava havt. Ongin fíggjarmálaráðharri hevur hækkað so nógv um tað almenna forbrúkið sum hann og eigur hann tí at halda munn.